## Fótbóltur við leikunum

Føroyingar luttaka í fótbólti á ársins oyggjaleikum. Talan er um ógvuliga væl skipaða kapping, sum fyrigongur hvørt kvøld kl. 21 á økinum við Hotel SunWing og SunGarden, har sera nógvir føroyingar halda til meðan leikirnir eru. Liðini eru gjørd eftir landafrøðiligum uppbýti, soleiðis at suðuroyingar til dømis klaksvíkingum o.s.fr. Serliga nógvir sørvingar búgva á SunWing, meðan flestu klaksvíkingarnir búgva á SunGarden, og millum føroyingarnar á Rhodos eru hotellini best kend sum SørWing og Úti í Grøv.



## Var lítið at gera

20 ára gamli Jóan Karl Joensen tók týsmorgunin lut í 400 metra renningini. Við eini tíð, sum var á leið hálvt sekund verri enn persónliga metið hjá Jóan Karl uppá 53,17 endaði hann á einum sjeynda plássi, og vann seg harvið ikki víðari í kappingini. Men tað vildi hann heldur ikki, um hann rann upp til sítt besta. – Har var ikki tað stóra at gera. Vindurin eftir breytini órógvaði meg kanska nakað, men tað er jú eins fyri allar. So talan vildi undir ongum umstøðum verið um víðari luttøku, segði kollfirðingurin, tá vit hittu hann eftir kappingina.

## Small um á golfvøllinum

Tað sá dramatiskt út, tá Ragnar Isaksen ikki orkaði meira á golfbreytini. Brádliga vildi kroppurin ikki meira, og liðfelagarnir máttu hjálpa til, so maðurin fekst inn í húsið, sum hoyrir til golfvøllin.

Seinni varð hann fluttur á sjúkrahús, men í morgun kundi Ragnar sjálvur staðfesta, at tilburðurin ikki er nakað, sum forðar honum í víðari luttøku.

- Tað var nokk bara tað, at eg fekk ov lítið salt. Eg syrgdi alla tíðina fyri at drekka nóg mikið, men tað vildi nokk verið betri, um eg hevði eitt sindur av salti í vætuni eisini. Reaktiónin hjá kroppinum er, at vøddarnir krampa seg saman, og tað var so tað, sum var hent hjá mær, segði læknin.

- Í morgun er tó eingin trupulleiki. Eg havi fingið onkra salttablettir í nátt, og eg eri sum fiskurin aftur, segði Ragnar, tá vit høvdu orðið á hann týsmorgunin.

So saman við hinum á føroyska golfliðnum fer Ragnar seinnapartin í dag undir næsta umfarið av golfkappingini.

*-mørk*

# Strævið men stuttligt

**Høgni R. Øster luttók á oyggjaleikunum í fjallasúkkling fyri fyrstu ferð. Hann hevði sett sær tvey mál og náddi bæði, tá hann fullførdi kappingina og ikki endaði aftast**

FJALLASÚKKLING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var seinnapartin í gjár á Agios Silas økinum, nakað sunnanfyri býin Soroni á vestursíðuni á Rhodos, at Høgni R. Øster traðkaði í pedalurnar fyri fyrstu ferð. Næstu góðu trý korterini koyrdi hann runt á einum 950 metra longum bana, sum hevði eitt sindur av hvørjum at bjóða uppá. Til tíðir slætt, aðrar tíðir eitt sindur meiri ófantaligt lendi, og so ein brekka, sum gekk at kalla loddrætt niður.

– Hatta var fínasta slag. Tað var strævið, men samstundis stuttligt, sigur vælnøgdi Høgni R. Øster, um kappingina.

Fjallasúkkling man fyri flestar føroyingar vera nakað fremmant, men Høgni hevur sjálvur fjallasúkkla síðani 1996.

– Um man hevur orku, teknikk og hampiliga føling við eini súkklu, so kanst tú saktans fjallasúkkla, sigur Høgni. Hann heldur ikki, at talan er um eina øra ítrótt, men viðgongur at tað er ein fyrimunur, at vera eitt sindur hálvsvakur, fyri at standa seg væl.



*Høgni R. Øster datt tvær ferðir undir kappingini, men fullførdi hana kortini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Her fer ein av teimum seks luttakarunum, sum ikki fullførdi kappingini orsaka av falli, bóltandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Datt tvær ferðir

Men hvat er so at standa seg væl? Høgni R. Øster hevði sett sær tvey mál til fjallasúkklukappingina á Rhodos. Fyrra var at fullføra teinin, tað vil siga ikki at gevast áðrenn tey trý korterini vóru liðin. Seinna var ikki at enda aftast. Bæði málini náddi Høgni, og tískil er hann eisini væl nøgdur.

Av 28 luttakarum endaði Høgni sum nummar 21. Seks máttu gevast tí teir duttu og meiddu seg so illa, at tað ikki kundu halda áfram. Tískil vóru tað í síðsta enda 22 sum kappaðust, og Høgni endaði frammanfyri tann aftasta av hesum.

Høgni datt eisini tvær ferðir sjálvur meðan hann súkklaði. Einaferð heilt tíðliga í kappingini, og so einaferð stutt áðrenn tað var liðugt. Báðar ferðirnar kom hann tó aftur á súkkluna og helt áfram.

### Fimleikur og fjallasúkkling

Hetta er fyrsta ferðin at nakar føroyingur roynir seg á fjallasúkklu til oyggjaleikirnar. Men oyggjaleikirnir eru tó á ongan hátt fremmandir fyri Høgna, sum tey flestu munnu kenna best sum fimleikara.

– Hetta her er heilt øðrvísi. Í fimleikinum kenna vit hvønn annan, so hetta er ein nýggj klika at koma inn í.

– Hetta er eisini ein longri kapping, so fyrireikingarnar eru nakað væl øðrvísi, sigur Høgni, tá hann samanber fimleikin, sum tekur ein góðan minutt, og so fjallasúkklingina, sum vardi trý korter.

Tankin um fjallasúkklu luttøku á oyggjaleikum er næstan seks ára gamal. Tað hevur tó ongantíð borið til, tí sum oftast hevur tað runnið saman við fimleikin. Men í ár var eingin fimleikur við á oyggjaleikunum, og so bar til. Nú hevur Høgni R. Øster so roynt tað, og tað er hann glaður fyri. Nú fer hann so at taka sær av løttum í nakrar dagar, áðrenn hann fer víðari til Isle of Man, har tær tjóðirnar, sum vanliga luttaka í fimleiki á oyggjaleikunum fara at kappast móti hvørjari aðrari, nú fimleikur ikki er á oyggjaleikaskránni.